# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Eyðin Thomassen, Sørvágur:

## 25 ára starvsdag hjá Landsverki



15. oktober 2004 hevði Eyðin Thomassen 25 ára starvsdag hjá Landsverki sum økisleiari í Vágum.

### 90 ára føðingardagur

Í dag, 19. oktober, fyllir Jóhannes Miðberg, Vestmanna, 90 ár.

Dagurin verður hildin saman við børnunum.

### Prógv

Fróði Madsen hevur 6 sept. 2004 tikið prógv sum kandidatur í pædagogiskari psykologi (Cand. pæd. pæd. psyk.) frá Danmarks Pædagogiske Universitet.

### Dagurin

**19. oktober. Baltasar**. Ein av teimum trimum vísmonnunum. Eftir halgisøguni bar hann skegg og var blámaður.

Bábelskt navn, ið merkir *Baal skal verja hann.*

## Jóhannus Miðberg
## (Jóhannus í Geiluni) Vestmanna
## 90 ár



Góði pápi, hjartaliga tillukku við 90 ára føðingardegi tínum í dag, 19. oktober.

90 ár er ein høgur aldur, men tú ber hann ótrúliga væl, ikki minst eftir sjúku fyri góðum ári síðani ert tú bara heilt byrgur aftur.

Vit systkin hava so nógv at siga tær takk fyri, orð gerast so fátøk, tá ið vit hugsa um alt, tú hevur verið fyri okkum øll.

Frá 14 ára aldri hevur tú strevast á havinum undir skiftandi umstøðum, hóast leingi burtur heimanífrá, tí túrarnir til Grønland og New Foundland gjørdust rættiliga langir. Eftir stuttan steðg heima, so legði tú aftur út á hav, burt frá tínum kæru, fyri at vit, ið heima vóru, kundu hava tað gott og onki mangla til lívsins uppihald. Við eini góðari konu og stórum barnaflokki, 6 systkin, gekk alt væl. Vit minnast okkara barnadagar við stórum takksemi, pápi, tí vit høvdu tað so gott.

Sum systkin kunnu vit siga við ein munn, tit eru okkum góð foreldur og ikki minst sum abbi og omma, langabbi og langomma. Alt tykkara lív er merkt av Gudstrúgv og tað vita vit sum systkin, at tú pápi saman við mammu og ommu bóru okkum á bønarveingjum, sum gjørdi, at vit vóru ein tryggur og glaður barnaflokkur í uppvøkstri okkara.

Pápi, tú hevur altíð havt eina sera góða sangrødd, sangurin fylti nógv í heimi okkara. Tá ið fyrsta harmonikan og síðani guitarin kom, tá vit vóru tannáringar, tá var nógvur sangur og tónleikur í heimi okkara. Felags fyri okkum, ið vuksu upp í býlinginum á Heygum, var tað góða samanhaldi familjunnar millum og heimini vóru altíð opin fyri børnum og ungum, somuleiðis í barnaheimi okkara.

Pápi, tú ert trúfastur maður og tað kundu skipsfelagar tínir sanna. Tú sigldi við sama reiðaríi í mong ár. Tá ið sluppirnar vórðu avloystar av trolarunum, sigldi tú við sama trolarafelag, »Stjørnan«, líka til tú gavst at sigla. Gullfinnur varð tann fyrsti, síðani Gullberg, so kom Kap Farvel. Hvønn sunnudag varð lisin lestur umborð og ikki vóru tað fáir lestrar, tú las, fastur forsangari var tú og tað skilja vit væl. Eisini var tað fastur skikkur at lesa lestur heima sunnudag, um ikki varð farið í kirkju, og skiftust vit sum oftast at lesa. Hetta gjørdist ein góð barlast at hava við út í lívið. Hóast árini eru mong kemur tú framhaldandi, um ikki so ofta sum fyrr, í Guds hús at hoyra gleðiboðskapin um Guds frelsandi náði og syngja Harranum lovsang.

Fyri okkum er tað ein stór gleði at uppliva, hvussu røsk tit bæði eru, pápi og mamma, mamma fyllir 85 ár í desember og tú 90 ár í dag, hóast tað so gongur dagurin sína dagligu gongd, tit passa húsið, matgera, gera reint og vaska klæði uttan nakra heimahjálp og tær tyngru uppgávurnar sum viðlíkahald, hjálpa vit tykkum við. Hóast høgan aldur og styrkin viknar, er blíðskapurin tann sami sum altíð, ongin sleppur avstað aftur, uttan at ein drekkamunnur verður boðin. Abba- og ommubørn, langabba- og langommubørn gleða seg at vitja tykkum, tí altíð er okkurt gott inni í skápinum, tá tey koma.

Pápi, tú ert vorðin ein bygdarmynd við tað at tú í mong ár hevur gingið morguntúr inn eftir ovara vegi, tá ið veðrið er til vildar, og mangt gott prát hevur tú fingið inni á bonkinum, tá ið tú stegðar á at hvíla teg. Pápi, vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 90 ára degi tínum við øllum góðynskjum um mangar góðar løtur í framtíðini saman við tær og mammu. Harrin signi og styrki tykkum.

Heilsan,

**børnini**

Frítíðarheimið í Skrivaragøtu, Tórshavn:

## Nýggjan sergjørdan Citroën

**Hósdagin 7. oktober læt bilasølan Ivan Johansen Bilar ein nýggjan sergjørdan Citroën Jumper til Frítíðarheimið í Skrivaragøtu í Havn. Sarvsfólkini á stovninum hava savnað pening inn til bilin**

BILUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*



*Hósdagin 7. oktober var ein nýggjur sergjørdur Citroën Jumper latin Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu, Á myndini eru: Jórun Dánjalsdóttir, stýrislimur, Elin Lindenskov, formaður í stýrinum, Pauli Waag, sølumaður hjá Ivan Johansen Bilum, og Ingun Mohr Jacobsen, leiðari á stovninum, saman við trimum búkarum, Theodor Esmar Hansen, Elvin Veihe og Tordur í Túni*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Bilurin hevur lyft aftan, og pláss er til tveir koyristólar. Pauli Waag, sølumaður hjá Ivan Johansen Bilum, sýnir her bilin fram*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Frítíðarheimið í Skrivaragøtu í Havn, ið er ein umlættingarstovnur, hevur fingið ein sergjørdan Citroën Jumper til at koyra sínar brúkarar til og frá ymiskum tiltøkum.

Bilurin er skiftur út við ein gott 8 ára gamlan umbygdan vøruvogn, sum hevði tænt fyri seg.

Nýggi bilurin er gjørdur til endamálið. Talan er um ein Citroën Jumper 2,8 HDI MH (miðal høgur) automatic við 128 hk dieselmotori, ið er uppbygdur í Danmark sum ein 9 persónabilur, ið lættliga kann gerast um, so pláss er til tveir rullustólar.

Hóast bilurin er stórur og rúmligur krevst einans vanligt koyrikort fyri at kunna koyra hann, soleiðis at starvsfólkini á stovninum sjálvi kunnu koyra hann.

Citroën hava spesialiserað seg í at gera sergjørdar bilar til nógv ymisk endamál, og bilurin lýkur øll ES-krøv til trygd.

Dragihurð er á síðuni, og aftan er ein lyft til at koyra rullustólar út og inn.

Á Frítíðarheiminum í Skrivaragøtu eru tey sera væl nøgd við bilin, sum lættir nógv um í teirra arbeiði.

Leiðarin á stovninum, Ingun Mohr Jacobsen, sigur, at starvsfólkini á stovninum hava savnað pening inn til bilin við tveimum stórum tiltøkum. Tá stovnurin fylti 25 ár, var stórt Tombola á verkstaðnum Vón á Argjum, og skipað hevur verið fyri neytamykjukapping.

Foreldur og avvarðandi hjá brúkarunum hava hjálpt væl til við at skaffa lutir, eins og fyritøkur, feløg, peningastovnar og einkultar kommunur eisini hava stuðla.

Vit vilja takka øllum, sum hava stuðla okkum so væl i innsavningini til bilin, sum er eitt neyðugt amboð í okkara arbeiði, sigur Ingun Mohr Jacobsen.



# Kunningarráðgevin nærkast

**Um eina góða viku verður kunningarráðgevin hjá løgmanni, Jóannesi Eidesgaard, settur í starv á løgmansskrivstovuni. Talan verður ikki um ein politiskan spunasmið, sigur Marjun Hanusardóttir, skrivsstovustóri**

NÝGGJUR KUNNINGARRÁÐGEVI
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Um eina góða viku verður kunningarráðgevin hjá Jóannes Eidesgaard settur í starv*

– Føroyska stjórnin er kanska tann einasta í heiminum, sum ikki hevur samskipandi fjølmiðlaráðgevar í aðalráðunum, og tí-skil umhugsa vit at fáa meiri skipaði viðurskifti við nýggjari kunningardeild í Tinganesi.

Hesi vóru orðini hjá løgmanni, Jóannesi Eidesgaard, á fjølmiðlarfestivalinum um mánaðarskiftið februar-mars. Nú røkist alt fyri, at løgmaður ikki nýtist at bíða longur til hann fær ein fjølmiðlaráðgeva ella kunningarráðgeva afturat sær á løgmansskrivstovuni í Tinganesi

– Jú nú er tætt uppundir. Innan eina viku vænti eg, at hann er settur, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Samskipari

Stjórin á Løgmansskrivstovuni, Marjun Hanusardóttir, greiðir frá, at uppgávurnar hjá kunningarráðgevanum verður fjølbroyttar.

– Hann kemur at leggja alla yvirskipaðu kunningina til rættis. Her hugsi eg um kunningar- og tíðindabrøv, samskipan millum ráðini og millum landsstýrið og sendistovurnar. Kunningarráðgevin skal fylgja gjøllað við, hvat útlendskir og føroyskir fjølmiðlar skriva um politikkin hjá landsstýrinum, sigur Marjun Hanusardóttir

Marjun Hanusardóttir sigur, at kunningarráðgevin verður ein fullfíggjaður partur av embætisverkingum, og hann verður eisini løntur sum ein embætismaður.

### Eingin spunasmiðjur

Embætisverkini uttanlands hava í dag siðvenju fyri at vera á tremur við bæði fjølmiðlaserfrøðingum og sonevndum spindoktarum ella spunasmiðjum. Tað er kortini ikki ætlanin í Føroyum, at nýggi kunningarráðgevin hjá løgmanni eisini skal virka sum ein politiskur spunasmiðjur.

– Hann verður ikki ein politiskur spindoktari. Hansara uppgáva verður at bera fram vitan, og gera tað lættari hjá borgaranum at fáa vitan. Samgongan hevur eisini sett sær sum mál at gera fyrisitingina meira opna, og í tí arbeiðinum fer kunningarráðgevin eisini at fáa ein týðandi leiklut, sigur Marjun Hanusardóttir.

15 fólk søktu uppruna-liga starvið sum kunningarráðgevi hjá løgmanni.

# Búskaparráðið villeiðir

**Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, svarar atfinningunum frá Búskaparráðnum aftur. Tað er beinleiðis osakligt og villeiðandi, tá Búskaparráðið sigur, at Vinnumálaráðið er orsøkin til ringu støðuna í alivinnuni, sigur Bjarni Djurholm**

KONJEKTURFRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, heldur, at Búskaparráðið er beinleiðis ósakligt og villeiðir í nýggjastu konjekturfrágreiðingini.*

*Mynd: Savnsmynd*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, vil ikki hava sitandi á sær, at hann og Vinnumálaráðið eru orsøkin til, at støðan í alivinnuni er so álvarssom, at vinnan í løtuni so dánt hórar undan.

Í feskastu konjekturfrágreiðingini finst Búskaparráðið hvassliga at Vinnumálaráðnum fyri handfaringina av kreppuni í alivinnuni.

Búskaparráðið vísir á, at Vinnumálaráðið fekk eitt rimmar varskó frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í 2000, men kortini valdi Vinnumálaráðið ikki at seta í gildi nýggjar og herdar reglur fyri aling og sjúkutiltøk fyrr enn um nýggjársleitið 2003.

– Tá Búskaparráðið konkluderar, at ikki fyrr enn við endan á 2003 verða settar nýggjar og herdar reglur viðvíkjandi alingini, so blandar Búskaparráðið appelsinur og sitrónur saman, tí Búskaparráðið blandar umhvørvis- og veterinæra økið saman. Tað er beinleiðis skeivt, at eingir reglar komu fyrr enn 2003, tí beinanvegin aftaná kanningina hjá AkvaplanNIva(kanningin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, blðm) vóru reglar gjørdar, har m.a. markvirði vóru ásett. Tí kemur BR til villleiðandi niðurstøðu, sigur Bjarni Djurholm.

Landsstýrismaðurin í vinnumálum leggur afturat, at Búskaparráðið hevur bert valt at nýta umhvørvisfrágreiðingina sum dokumentatión fyri sínum uppáhaldum um, at Vinnumálaráðið er orsøkin til støðuna í alivinnuni.

– Hetta er beinleiðis ósakligt og villeiðandi. Tað er eisini hugvekjandi, at Búskaparráðið bert hevur biðið um ta einu frágreiðingina. Hví hevur Búskaparráðið ikki vent sær til Vinnumálaráðið, spyr Bjarni Djurholm.

## Harlou hartar Búskaparráðið

**Landsdjóralæknin, Bjørn Harlou, finst í lesarabrævi í bløðunum í dag hvassliga at niðurstøðunum hjá Búskaparráðnum um trupulleikarnar í føroysku alivinnuni**

KONJEKTURFRÁGREIÐING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Spurningurin er um støðan, vit eru komin í, við stórum arbeiðsloysi og húsagangi í hesari vinnuni, ikki partvís var óneyðug, um stig vórðu tikin sambært serfrøðingaávaringunum fyri fleiri árum síðan.

Í Sosialinum leygardagin endurgóvu vit niðurstøðurnar hjá Búskaparráðnum í samband við alivinnuna, og talan var greið.

Føroya Landsstýrið hevði sovið í tímanum, tí hóast eitt rimmar varskó frá Heilsufrøðiligu Starvstovuni longu í 2000, fekk Vinnumálaráðið ikki sett í gildi nýggjar og herdar reglur fyri aling og sjúkutiltøk fyrr enn um nýggjarársleitið 2003.

Hetta hevur fingið landsdjóralæknan, Bjørn Harlou, at taka blaðið frá munninum. Í lesarabrævi í Sosialinum í dag finst Bjørn Harlou hvassliga at Búskaparráðnum fyri at siga sína hugsan um hvussu ILA skuldi verið niðurbart.

–...Når Búskaparráðið og andre økonomer udtaler sig om, hvordan bekæmpelsen af ILA burde være foregået, er det omtrent lige så interessant, som hvis ortopædkirurgerne på Landssjúkrahúsið havde udtalt sig om, hvørdan Norrønas havari kunne være undgået, og hvordan skaderne på skroget burde repareres, sigur Bjørn Harlou millum annað.